Ummæli:



# Leivi Eidesgaard til minnis

Leivur varð borin í heim 4.3.1930, var yngstur av børnunum hjá Jústinus og Magninu í Oyndarfirði og sostatt restaði 14 dagar í 70 ára aldur, nú boð vóru eftir honum.

Leivur fór sum flest allir ungdómar tá í tíðini, til skips og helt hann seg til tað, nú árarnar vóru lagdar inn.

Hann nam sær skiparaprógv sum ungur og fór við tað sama at sigla sum yvirmaður, í nógv ár sum skipari og tey seinastu árini á egnum kjøli.

»Træið er best at mána, tá tað er felt«.

Tá eg skal royna at skriva nøkur orð um farbróður, er tað við blandaðum kenslum, tí eg havi so nógv góð minnir um hann, bæði tá man var barn og ikki minni síðani man bleiv vaksin. »Hann fylti so nógv, har hann kom, ella var«.

Tað var soleiðis tá eg var smádrongur at so skjótt sum eg fekk frí frá skúla, var at sleppa norður um »Boðar« og plagdi eg at skifast at búgva hjá fastir, hjá Bodil og Leivi. Tað eru nógv góð og rík minnir eg havi frá teimum árunum.

Leivur var við Matildu úr Leirvík tað Harrans árið Karin K. var í Grønlandi við bátum og mær er sagt at longu tá, vísti hann hvør dugur var í honum.

Tá stállínuskipini byrjaðu at koma, fór hann at sigla sum stýrimaður við Havørnini og var har í fleiri ár.

Miðskeiðis í 70'unum fór hann at føra skip hjá Frederik í Rituvík, fyrst Mariu og síðani Edith M. Tá prógvaði hann veruliga, hvør fiskimaður hann var.

Nøkur ár seinni ognaði hann sær, saman við synum sínum, snellubátin »Sjóartún« og tað má sigast at væl hevur ligið fyri at fingið. »Dugandi maður finnur sær vápn« sigur orðatakið. Eisini tá dreingirnir hava verið við bátinum, so tað má sigast væl er lagt í.

Tað er soleiðis at pápi mín er elstur av dreingjunum og Leivur yngstur og eg má siga, at bróðurkærleikin teirra millum, hevur verið fyrimyndarligur, serliga hesi seinastu árini hava víst, hvussu góðir teir hava verið hvør við annan.

Tað er einki dulsmál, at teir báðir hava verið útatvendir menn og hava bæði tosað og skrivað og havt sínar meiningar um tað sum rørir seg í landi okkara.

At Leivur ikki var vinarleysur, prógvaði tann stóra mannfjøld, sum var og fylgdi honum.

Vinmaður mín á »Gjaranesi« segði nógv gott um farbróðir og tók í sálm 100 um trúfesti og hjálpsemi, vit eru nógv sum kunnu geva presti rætt í tí, at soleiðis var Leivur. Hann hevur gjørt snørið upp og tikið loddið inn, nú verður sum er hesumegin.

Nú er slætt og tú ert komin inn í havnina, sum ber av øllum, og sum Harrin hevur gjørt øllum til reiðar sum trúgva á hann.

Ein sangur sigur »møtast og skiljast er lívið her« og soleiðis er tað, ein nú og annar tá.

Aftan fyri hvønn góðan mann stendur ein ikki minni góð kvinna, og tað má sigast um Bodil at hon hevur verið Leivi ein góð kona. At kalla alt, sum var at gera uppi á landi, tók hon sær av og syrgdi fyri, at tað bleiv gjørt, tí at húsbóndin var til fiskarí.

Góða Bodil og børnini, tankar okkara eru hjá tykkum, nú Leivur ikki er her meira. Mátti Harrin í ríku náði síni givið tykkum styrki í tíðini fyri framman.

Við hesum orðum vil eg lýsa frið yvir farbróður.

**Heini á Marknagili**
**Klaksvík**

## Skyldmanninum

# Poul Martin Joensen

## Fuglafjørður

## Poul Martin uppi á Trøðni til minnis

Sunnudagin 27. Februar varð Poul Martin borin út. Foreldur hansara vóru Olevinus og Andrea í Tøðuni. Olevinus var sonur Jegvan í Tøðuni, sum var giftur Sjúðra Siggu. Langomma, Kathrina gift við Hans Anthoniussen, langabba úr Oyndarfirði, var systir Siggu. Sostatt vóru Olivinus og abbi, Danjal J. Anthoniussen úr Oyndarfirði, systkinabørn. Ættarbond vóru eisini millum ommu í Ansastovu, Lenu og Andreu. Tær vóru trímenningar.

Komu fólk úr Ansastovu til Fuglafjarðar, varð stokkið inn á gólvið í Tøðuni ella hjá Annu á Trøðni. Tá var ættin eitt og alt. Ættarbondini vóru hildin uppi í trúfesti. At vera burturblíður, var lítisvirt í manna eygum, og ikki kundi annað sigast, at blíð vóru tey í Tøðuni.

Poul Martin var stillur og friðarligur. Onkuntíð varð tikið til á donskum: " En stil mund og en ren hånd priser man i alle land." Tað er ein dygd, ikki at leypa framav. Tú kanst hava tína meining og vera støðufastur uttan nakað hóvasták og fara avstað í sátt og semju - bera fram tað, tú sjálvur heldur vera rætt og kanska eisini vegleiða og vísa á gongdar leiðir ikki einans í orðum, men eisini í verumáta. Tað kundi tú siga um skyldmannin. Stórorðaður var hann ikki. Stór orð kunnu ikki fylla ein sekk, men ræða ein dára.

Mannin hevur tú kent frá barnsbeini av. Nøkur ár var hann á sjónum, men gjørdist vrakari. Tá ið skipini hjá Pidda, Sigurdi og Haraldsen komu frá fiskiskapi og landað varð í Fuglafirði, stóð hann her og vrakaði. Fiskurin var hivaður upp úr lastini upp á Brúnna í passaligum segldúkum við lykkju á í báðum endum, lagdur upp á eitt borð og vrakaður. Onkur stóð og teknaði vektirnar — skrivaði upp, meðan rópt varð: Millumfiskur, bank_ fullfavn, ein av nýggjum og so varð svarað aftur: Ein av nýggjum o.s.fr. Hetta rungar enn í heysinum frá barnsbeini av. Dreingirnir sluppu upp í part. Stóðu við gerduna, vóru í lastini ella løgdu upp á borðið. Her stóð vrakarin blíður og blíðorðaður, rósti óvitunum. Hetta gjørdu teir vaksnu allir meir ella minni, og tú kendi teg væl, var við til at gera manslít. Hugur og sál mentust bara av at vera við í hesum drátti í bygdarlívinuum.

Um hetta mundi vóru allir fedrarnir á sjónum meginpartin av árinum. Heimamenninir vóru ikki so nógvir, men Poul Martin var har. Hann livdi við í bygdini, og tú sást hann til fjals og fjøru. Hann stóð á Brúnni og vrakaði og var røktingamaður í Innandals saman við Alfred Klein í mong ár. Her vóru góðir dagar. Ikki eru so mong ár runnin, síðani teir løgdu frá sær. Teir fóru frá báðir í senn og var so ein partur av bygdarsøguni ritað í steinar og grýti í Innandals.

Poul Martin átti eisini jørð í Góðadali. Poul á Trøðni — abbi Poul Martin segði, at tá ið hann hevði gott blóð og var yviri á Góðadali, var hann Guði næst. Hetta er ikki ørvitistos. Gáðadalur er ein gotiskur katedralur. Her er høgt til lofta og vítt til veggja og súlurnar røkka til skýggja, ei dáni í at Várharra býr ímillum Rustakamb og Róvina, og satt at siga ert tú honum næst, tá ið tú ert staddur niðri í Kjóalágni ella yviri á Kálvaslætta. Hetta kenna øll, sum hava gingið um hesar leiðir í kavadøgum, stúkudøgum og sólfyltum summarløtum.

Í eini tríati ár gekst tú saman við Poul Martini hesar leiðir. At taka seg niðan frá ein góðan dag og koma niðan á Háls og líta yvir Norðoyggjarnar og skoða dalin, er sjón av gudgivnum glarmeistara. Meðan gingið varð, varð mangt málið havt á lofti. Bygdamál, bíbilsk mál, politikkur og sjálvandi prát um seyð og seyðarøkt. Tú lurtaði eftir teimum eldru. Teir tugdu orðini, meðan fjallmenninir komu tenjandi um Botnsbrúgv og niðan á Háls.

So mangan var gott prát við Poul Martin.



Hann kendi hesa leið sum sín eygnastein. Satt at siga umbroyttist tú eitt sindur, meðan gingið varð niðanfrá. Verður komið at tinnuni, kendi tú mannin sum ein gudsóttandi mann. Hann bar upp á mál ymisk viðurskifti úr gerandisdegnum og kristnilívinum. Onkuntíð vísti hann á staðin, har abbi, Thomas Johan, hevði sítt Jákupsa stríð á Skarðinum. Tá varð steðgað á, og tankarnir í tónum goymdu so mikið eftir um staðin, at staðurin er halgaður minni um farnar dagar, har lívið var einkult í mangar mátar, men stríggið frá morgni til myrkurs. Tað, sum her rann fram fyri teg úti ímillum fjøll, var skaldskapur og sálarburður av einari aðrari verð.

Fyri nøkrum árum síðani var bøtt um mannagøtuna og varðarnar á Skarðinum. Hetta var tiltak, sum kom undir heitið: Ung í arbeiði og var Poul Martin við í hesum tiltaki. Hann segði so skemtiliga, tá ið ábøtingin var liðug, at hann var stjóri í hesum fyritaksemi. Hetta var so skemtiliga sagt, at tey ungu, sum vóru við, minnast hesar løtur hetta summarið, sum ein serligan drátt frá ungdómsdøgunum. Fagnaðarløtan á Skarðinum hetta summarið í august var ein skygging – eitt endyrskin frá farnari tíð og farnum døgum.

Poul Martin var væl fyri henda dag, og eftirsíðan sást hann hvørja ferð, millum tey, ið leitaðu sær niðan á Skarð í august. Ikki so sjáldan tók hann orðið úti millum fjalla. Hetta er nú ein fastur táttur av mentanarlívinum, at fara niðan á Skarðið í august, tá summarið er við at halla. Hetta er ein góður vani, og er kó av manninum ljóslivandi millum varðarnar á Fuglafjarðarskarði.

Seyðamaðurin, vrakaraeftirlitismaðurin, deknurin og prædikumaðurin, Poul Martin lýsti tilveruna í fáum orðum, men tað var eisini nóg mikið.

Eingin skal um sin dag ganga. Heldur ikki Poul Martin fekk loyvi til at vera longur her enn avmált. Hann situr nú á himnateigum millum varðar, bygdamenn og annað gott fólk og sigur frá.

Æra veri minni um skyldmannin, Poul Martin.

**Frits**



HYGG & HOYR Fríggjadagur 10. mars

# Lindin í vøkstri

*Kristiliga krinvarpið, Lindin, hevur nú verið at hoyrt í seks vikur, og longu nú er senditíðin økt*

JÁKUP MØRK

Seinastu tíðina hava vit her í Føroyum havt tann heldur óvanliga møguleika, at vit hava havt ikki færri enn tríggjar føroyskar útvarpsstøðir at velja ímillum.

Nýggjasta av hesum er kristiliga kringvarpið Lindin, og hóast støðin bert er seks vikur gomul, hevur hon longu ment seg rættuliga nógv.

**Økja um skránna**
Preben Hansen, sum er ein av nevndarlimunum í sjálvsognarstovninum Lindini, sigur við Sosialin, at teir longu nú hava havt eina munandi øking í programsenditíðini.

Støðin sendir hvønn dag frá kl. 13.00 til 23.00, tó fríggjadag til 02.00, og í løtuni er býti í senditíðini soleiðis, at umleið 20% verða nýtt til programsendingar, meðan eini 80% verða nýtt til tónleik.

Ætlanin er so, at hesi 20% so líðani skulu økjast upp til eini 30 ella kanska 40%, men hetta er so ein menning, sum má koma so líðandi. Alt arbeiði á støðini er sjálvboðið, og tískil ber ikki til at leggja ov stórar byrðar á einstøku herðarnar, men Preben er tó fegin um alla ta hjálp, sum støðin higartil hevur fingið.

– Vit hava fingið positivan respons frá rættuliga fitt av fólki, og eisini fíggjarligi stuðulin til støðina er í vøkstri, og hetta eru vit sera fegin um, greiðir Preben frá.

**Sendiøkið skal víðkast**
Skráin er tó ikki einasti parturin av Lindini, sum er í vøkstri, tí sambært Preben, so er eisini ætlanin at víðka um sendiøkið komandi tíðina.

Kring landið hava felagsskapir skipað fyri innsavnanum, soleiðis at fígging fæst til uppsetan av fleiri sendarum.

Í løtuni er bert tann eini sendarin, men longu í hesum ári, er ætlanin at sendari skal setast upp á Brúnaskarði, soleiðis at Klaksvíkskingar eisini hava møguleika at hoyra støðina.

Vágarnar standa eisini á skránni, men her eru ymsir tekniskir og landafrøðiligir trupulleikar, sum gera, at tað helst gongur eitt sindur av tíð, fyrr enn vágafólk sleppa at hoyra støðina.



*Preben Hansen, sum er ein av nevndarlimunum í sjálvsognarstovninum Lindini*

ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Arngrímur og Æblemanden

Marna Jakobsen, exam. art., skrivar

Eg trúgvi, at nógv landbúnaðarfólk mundu lurta eftir *Krosskasti* seinasta mikudag. Kjakið var áhugavert og sakligt, kanska tí at vit hesa ferð sluppu undan fleiri politikarum. Hesu ferð var bara ein, so hann hevði ongan annan politikara at skeldast við, og hann royndist væl.

Um eg átti ein, hevði eg tikið hattin av fyri sjónvarpinum, at teir tóku hendan spurningin upp til kjak. Eg haldi, at tað er uppá tíðina, at fólk finna útav, at landbúnaðarvinnan ikki handlar um nakrar ullalagdir, sum sløðast í haganum og eru til ampa fyri fuglin, og hóast alt gott er at siga um tað, so handlar tað heldur ikki um at hava nakrar seyðir sum ítriv. Tað var stuttligt at hoyra fólk, sum dagliga arbeiða við landbúnaði, tosa um umstøðurnar at liva av hesari vinnu. At umstøðurnar eru vánaligar vita øll, sum hava nakað við hesa vinnu at gera. Eg helt tað tó vera rætt, at Finnbogi Arge nevndi spurningin um festikonto, sum ger at bóndir sínámillum eru ymiskt stillaðir, og har nyttaðu argumentini hjá bóndanum í Havn lítið, tí Heilsufrøðiliga Starvsstovan røkkur eisini út á bygd og luktiorganinum á bygd feilar heldur einki. Finnbogi Arge var ógvuliga greiður, tá ið hann tosaði, so spennandi verður hvat spyrst burtur úr.

Ein tendensur hevur verið og er enn at tosa um landbúnað í Føroyum sum eina vinnu, sum er til ampa fyri landið. Nú skal landbúnaðurin opinbart royna at prógva sín tilverurætt sum mentanarberi og ikki sum vinna. Eg hevði tó varhugan av, at teir bóndir, ið vóru í sjónvarpsstovuni, meira sóu seg sum matframleiðarar enn sum mentapávar. Tíbetur, má eg siga, tí tann dag landbúnaðurin skal rættvísgera sína tilveru sum mentan, tá er tíð at hanga mjólkimaskinuna á veggin á sama hátt sum rokkahjólið og karðarnar.

**Hava okkurt at læra**
Samstundis sum vit tosa um, um tað loysir seg at framleiða mat í Føroyum, so hoyrist í tíðindum, at tey í Mosambique eta rottur at haldi hungurin frá durinum, jú ymiskt er.

Hóast flestu av okkum enn gera mat, so at húsfólkið ikki gongur svangt, so ber sendingin *Okkara kokkar* boð um, at matur eisini verður gjørdur til stuttleika. Sendingin er góð, tú fær nógv at vita. At so Gudmundur pástendur, at fennikel er at fáa um alt landið, fyrigevi eg honum, hann hevur kanska ikki verið í Skálavík við Jóan Peturi. Eg má viðganga, at eg ikki skilji Gudmud so væl alla tíðina, men tað verður kanska betur. Í øllum førum, so hugna teir sær, meðan teir práta um mangt og hvat, men viðhvørt haldi eg, at teir gloyma, hvar tólið er, sum teir skulu hyggja í, tá ið teir tosa beinleiðis við hyggjaran, tað kundi onkur kanska fortalt teimum.

**Óskyldugt og tó**
Eg má siga sum sannheit er, at ikki havi eg lurtað nógv eftir útvarpinum hesa seinastu vikuna, tað tykist mær, at hvørja ferð eg tendri lurtið, so er antin ein endursending ella tónleikur.

Eg setti mær tó fyri, at tvær sendingar skuldi eg lurta eftir hesa vikuna. Tað vóru sendingarnar: *Ein kvøðari úr Dali* hjá Árna Dahl og *Um altíð hvør mín limur*, sum Sverri Egholm, M.Restorff Jacobsen og Janus Mohr hava lagt til rættis.

Eg varð ikki vónsvikin. *Um altíð hvør mín limur* er fyrsta sending av sjey um sálmaskaldið Petter Dass. Hesa sending vil eg viðmæla øllum at lurta eftir. Henda fyrsta var ein breið lýsing av lívi hansara, seinni vænti eg, at nærri verður komið inn á menniskja og sálmaskaldið Petter Dass.

Sendingin um Jens Ludvig úr Dali var hugtakandi. Stuttligt var at hoyra hann tosa við Mortan Nolsøe sála og hoyra upplisið um uppvøkstur hansara, sum nú á døgum er sum ein heilt onnur verð, hóast so stutt síðani.

Tað vóru ikki Guttorm og Arngrím tær í Creamy sungu um, tá ið eg seinni um kvøldið setti meg at hyggja at hesari sendingini. Nei, nú var tað um Lars Ejnar og Æblemanden. Sendingin var sera væl gjørd og lýsti væl hesar báðar óspiltu genturt, sum livdu tann dreymin út, sum so mangar aðrar gentur ikki fáa høvi til. Tær dugdu ótrúliga væl at upptraðka, og sangrepertoarið var ógvuliga óskyldugt. Kanska er tað sovorðið, sum skal til, at halda lív í teimum gomlu donsku barnasangunum. Eitt upplop er hetta ivaleyst, men tað eru neyvan bara tær báðar, sum fáa pening burtur úr. Tey, ið skipað hava fyri, hava klárað at selt atgongumerki til børn heilt niður í barnagarðsaldur, so nú verður tað skjótt soleiðis, at tey børn í barnagarðinum, sum ikki hava verið á seinastu konsert, eru fullkomuliga ytt.

**Djarvar útsagnir**
Tá ið eg hugdi at *Innskoti* mánakvøldið, hugsaði eg um, um ein mannligur stjóri hevði tosað soleiðis um starv sítt, sum hendan kvinnan gjørdi. Kanska var tað tí at 8 mars, altjóða kvinnudagurin, var so nær, at eg fekk slíkar tankar. Ikki tí, eg minnist fyri nógvum árum síðani, at ein svenskur forsætisráðharri segði seg úr starvi, tí hann hevði ov lítla tíð saman við familju sínari, so tað kemur fyri.

Í øllum førum var niðurstøða mín, at hon var ógvuliga djørv, bæði tí at hon hevur sagt seg úr starvi, og tí at hon torir at traðka alment fram og siga frá, hví so var. Hon kom inn á nógvar sera týðandi spurningar, sum t.d. hetta at blíva avhengigur av at vera stjóri: góð løn, sjálvsavgerðarrættur og at kenna seg týdningarmiklan. Hon hevur so torað at viðurkent, at hon mátti taka eina pausu, fyri at finna seg sjálva aftur. Eg trúgvi at stjóri ella ei, so munnu vera fleiri, ið høvdu ynskt seg at havt henda møguleikan.

Sendingin *Føroyar og framtíðin* var hesa ferð um Uppritið, sum vit øll hava bíðað so spent eftir. Samráðingargrundarlagið varð væl og virðiliga gjøgnumgingið av báðum útvarpsmonnunum, og aftaná var samrøða við Høgna Hoydal. Hann er tann sami sum altíð. Hevur altíð svar uppá allar spurningar, ein superoptimistur, sum heldur tað vera púra natúrligt, at danir ganga við til øll tey føroysku krøvini. Eg má siga, at eg eri ikki sørt imponerað, at ein maður, í hansara stað, kann vera so bjartskygdur, hann verður jú so útskeldaður sum fáur. Eg ivist ikki í tí, at hann hevði kunnað argumenterað gott og grundiga fyri, hví vit skulu hava danska drotning í Føroyum, ístaðin fyri at velja eina føroyska.

ÚTsjón Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN